Clinton kemur 1. oktober

Nú er tað endaliga staðfest, at fyrrverandi forsetin í USA, Bill Clinton, kemur til Føroya mánadagin 1. oktober saman við Hans Blix, fyrrverandi vápnaeftirlitsmanni. Teir báðir fara at luttaka á ráðstevnu í Norðurlandahúsinum.
- Vit eru sera fegin um, at tað eydnaðist at hava tiltakið, sigur formaðurin í Arbeiðsgevarafelagnum, Jóhan Páll Joensen í stuttari viðmerking. Upprunaliga skuldi Clinton koma 24. mai, men tað barst honum frá. Magni Arge, sum er limur í fyrireikingarbólkinum hjá Arbeiðsgevarafelagnum, hitti Bill Clinton og Kofi Annan, fyrrverandi ST-aðalskrivara í Oslo 23. mai: ”I always wanted to go there - I want to see the Faroe Islands” segði Clinton tá við Magna Arge.

Suðurføroyar kenna seg hóttar

Fólk í Suðurføroyum kenna seg hótt av spurninginum um eitt valdømi. Ein greiður meiriluti av fólkunum í Suðuroy og í Sandoy eru ímóti uppskotinum

VALDØMI

Rigmor Dam og Niels Uni Dam

Gallup-kanningin um eitt valdømi, sum Sosialurin hevur latið gjørt, vísti, at meirilutin av føroyingum eru fyri einum valdømi. Men stórur munur er á úrslitinum norðanfyri og sunnanfyri. Ikki óvæntað vísir kanningin eisini, at tess nærri fólk eru at høvuðsstaðnum, tess meira eru fólk fyri einum valdømi. Sostatt er munurin millum tey sum siga ja og nei minni í Vágum og í Norðoyggjum, enn í miðstaðarøkinum. Komandi dagarnar hyggja vit at býtinum millum inntøkubólkar, størv og útbúgvingarstøði hjá fólkunum, sum hava luttikið í kanningini.
Heldur óvæntað eru ungdómar í aldursbólkinum 15-24 millum tey sum eru mest ímóti at Føroyar gerast eitt valdømi. Fólk í aldursbólkinum 40-49 eru mest fyri.



Mótstøðan størst sunnanfyri

Sum væntað er sunnari partur av landinum mest skeptiskur mótvegis einum valdømi. Í Sandoy eru nærum helmingurin ímóti, meðan 30 prosent eru fyri einum valdømi. Men samstundis eru heili 22 prosent, sum siga seg ivast enn. Í Suðuroy er meirilutin ímóti uppaftur greiðari, har 55 prosent siga seg vera ímóti, meðan 38 prosent er fyri. Har hava eisini fleiri fólk tikið støðu, tí bert 8 prosent siga seg ikki vita. Hesi úrslit samsvara væl við støðuna hjá tinglimunum úr hesum báðum oyggjum, sum eftir øllum at døma eru ímóti.
Sum vit eisini kundu vænta, so eru fólk í miðstaðarøkinum mest íðin fyri einum valdømi, og tess longur burtur fólk eru frá miðstaðinum, tess minni undirtøku fær uppskotið um eitt valdømi. Sostatt eru fólk í Vágum og í Norðoyggjum eisini ímóti, men har eru tølini kortini javnari enn í sunnara parti av landinum.



Valdømi	Norð	Eyst	N-Str	S-Str	Vágoy	Sandoy	Suðuroy	Samlað
Ja	35%	59%	57%	72%	36%	30%	38%	56%
Nei	38%	22%	15%	14%	41%	48%	55%	26%
Veit ikki	27%	19%	27%	14%	23%	22%	8%	18%
Samlað	100%	100%	100%	100%	100%	100%	100%	100%